

**REGLULIGT**

*Hóast Marjun Andersen Jacobsen skal koyra úr Syðrugøtu higar hvønn einasta dag, er hon altíð til arbeiðis, hóast veðrið kann vera so sum so. - Eg havi bara forsømt einar tveir dagar, sigur hon*

# Úr øllum heraðshornum

Hóast Greipan liggur í Oyndarfirði, heldur tað ikki fólki aftur í at koma higar til arbeiðis hvønn einasta dag. Heldur ikki á vetrartíð, tá tað líkasum hoyrir við til koyrilíkindini hjá Landsverki, at hált og glerstoytt er á Oyndarfjarðarvegnum.

Her á virkinum koma fólkini so trúliga úr øllum heraðshornum. Onkur kemur úr Syðrugøtu, onkur av Toftum, meðan onnur koma úr Lamba, og heilt úr Kollafirði.

– Tað er eitt gott við hesum, at vit eru ymsa staðni frá. So lærir ein fleiri fólk at kenna.

– Og eg veit ikki, – vit koma sera væl út av tí við hvønn annan, og prátið gongur ordiliga væl millum okkum, sigur Marjun við einum brosi.

## Man venur seg við tað

Marjun Jacobsen má hvønn morgun koyra teir 22 kilometrarnar úr Syðrugøtu og allan vegin til Oyndarfjarðar.
Hetta hevur nú gjørt so ofta, at hon nærum ikki hugsar um tað longur - at hon skal eftir skarðinum til arbeiðspláss sítt í Oyndarfirði.
- Tað er faktist slett ikki so ringt at koyra higar, slær hon fast. - Man venur seg skjótt við tað.
Hinvegin krevur tað eisini, at ein hevur ein góðan og tryggan bil, sum eisini startar hvønn einasta dag, bæði vetur og summar.
Hóast veturin hevur verið harður og kaldur, hevur hetta ikki forðað Marjuni stórvegis í at kunna koyra millum heimið og arbeiðsplássið.
- Eg haldi, at tað hava bert verið einir tveir dagar, har eg ikki eru komin higar orsakað av ringum koyrilíkindum, sigur Marjun.
Hon verður nærum avbrotin í setninginum, tí eitt av starvsfólkum hennara vil fegin geva henni nøkur rósandi orð á vegnum.
- Eg haldi, at tað er fantastiska flott av henni, at hon arbeiðir her hjá okkum. Eg meini, - hon fer úr Syðrugøtu hvønn dag, skal fyrst avlevera eitt barn til stovn í Leirvík og síðani leggur hon leiðina higar.
- Eg hugsi um, at hon kundi eins væl arbeitt á fiskavirkinum í Gøtu, sum hon jú koyrir framvið áðrenn hon kemur her. Vit eru ógvuliga glað fyri at hava Marjuna her. Hon er ófør.